# narknaðarføringin ng enn innihaldið

TING-HELLAN



*Nú verður sagt, at Anders Fogh Rasmussen hevur spílað seg út fyri at fáa fatur á konufólkunum*



*Mogens Lykketoft plagar at siga, at hagtalsliga hava 60 prosent av veljarunum í hvussu so er eina ferð atkvøtt fyri Javnaðarflokkinum*

ættarliðnum hjá teimum, sum alt sítt lív stuðlaðu Javnaðarflokkin. Samhaldsfesti hevur ikki sama innihald, sum tað hevði.

Veljarin er ikki longur floksbundin. Talið á kjarnuveljarum er minkað, og talið á marginalveljarum økist. Mitt í hesi vikuni varð roknað við, at 900 túsund veljarar framvegis ivaðust. Tað er ein rættuliga stórur partur av veljarafjøldini. Tey flestu av teimum ivandi sigast at vera konufólk. Lutfalsliga stórur partur av teimum hevur hildið seg til Javnaðarflokkin.

Valstríðið er sølumarknaður. Í staðin fyri at fríggja til samfelagsstættir verður fríggjað til áhugabólkar. Allir geva lyftir til barnafamiljur, pensionistar, arbeiðsleys, lesandi og lærlingar og allar hugsandi bólkar. Um vallyftini verða vigað í fíggjarlógum, so høvdu útreiðslurnar verið mangar ferðir størri, enn tær nú eru.

Nú verður sagt, at Anders Fogh Rasmussen hevur spílað seg út fyri at fáa fatur á konufólkunum. Spinndoktorarnir hava síðstu mánaðirnar ráðgivið honum, at hann skal leggja seg eftir at fokusera upp á bleytu virðini. Eitt nú spurningar, sum hava við barnafamiljur og gomul at gera. Tað hevur forsætismálaráðharrin gjørt, og nú ivast nógvar kvinnur í, um tær annan týsdag heldur skulu velja Vinstra flokkin enn Javnaðarflokkin.

Anders Fogh hevur lúrt Tony Blair av, og tað hevur hann dugað so mikið væl, at Vinstri flokkurin er størsti flokkur í Danmark, og eftir øllum at døma verður hann uppaftur meiri størstur eftir valið.

Valúrslitið sigst verða tengt at trúvirðinum hjá teimum, sum royna at selja boðskapin. Anders Fogh tykist vera betri sølumaður enn Mogens Lykketoft. Hann hevur størri útstráling, kennist meiri miðvísur, tryggur og greiður í sjónvarpinum, og tað hevur við sær, at tað rennur nógv í atkvøðukassan hjá Vinstra flokkinum.

Mogens Lykketoft plagar at siga, at hagtalsliga hava 60 prosent av veljarunum í hvussu so er eina ferð atkvøtt fyri Javnaðarflokkinum, og at teir eiga at hugsa um aftur hesa ferð at seta krossin har, men soleiðis verður tað eftir øllum at døma ikki. Um ikki okkurt heilt óvæntað tekur seg upp síðstu vikuna í valstríðnum, so fer Javnaðarflokkurin, sum fram í seksti árini og eisini síðst í sjeyti árunum og fyrst í níti árunum átti væl omanfyri triðingin av atkvøðunum og harvið náturliga átti stjórnarberandi leiklutin, hesa ferð at detta niður móti fjórðinginum av atkvøðunum, meðan Vinstri flokkurin fer at fáa meiri enn triðingin.

Úrslitið hjá Javnaðarflokkinum fer harvið at minna um katastrofuvalið í 1973.

Um úrslitið verður, sum kanningarnar benda á, so er tað søguligt, at Vinstri flokkurin fer at halda fram í forsætismálaráðnum. Tað er ongantíð komið fyri áður í tey 104 árini, síðani stjórnarleiðslan í Danmark gjørdist treytað av parlamentariskari undirtøku. Tað er ofta komið fyri, at skiftandi formenn í Javnaðarflokkinum hava hildið fram í forsætismálaráðnum eftir val, og í áttati árunum var Poul Schlüter úr Konservativa Fólkaflokkinum stjórnarleiðari í tíggju ár. Hann tók við í 1982, og hann helt fram eftir valini í 1984, 1987, 1988 og aftur í 1990.

Nú bendir alt á, at formaðurin í Vinstra flokkinum fer at halda fram. Í staðin fyri at Javnaðarflokkurin skal vera í lyklastøðu, soleiðis sum hann fyri tað mesta var tað í ídnaðarsamfelagnum frá í 1920unum og fram til 1982, so tykjast danir í nýggja og globaliseraða vitanarsamfelagnum og nýtslusamfelagnum vilja hava stjórnarábyrgdina at ganga eftir tørni, og tørnini eru umleið tíggju ár. Poul Schlüter átti áttati árini í forsætismálaráðnum, Poul Nyrup Rasmussen átti níti árini, og Anders Fogh Rasmussen tykist skula eiga fyrsta tíggju ára skeiðið í hesi øldini.

Tað kann væl vera, at úrslitið fer at laga seg soleiðis, at tað fer at bera stjórnarleiðaranum til at velja ímillum, um hann fer at vilja hava Dansk Folkaparti ella Radikala Vinstra Flokkin sum parlamentariskt grundarlag afturat Konservativa Fólkaflokkinum. So stinnir hava Konservativi Fólkaflokkurin og Vinstri flokkurin ongantíð áður staðið saman. Men í politikki eru tíggju dagar long tíð, so nú fæst at síggja.